**Býráðsfundur mikudagin 25. oktober 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Hanna Jensen, og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi**: Jan Erlingsson Petersen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **10/00408**<br>**Upptøkureglar til stovnar á dagstovnaøkinum í Eysturkommunu**<br>Trivnaðarnevndin mælir til, á fundi tann 13. september 2010, at taka undir við upptøkureglunum til ansingarstovnar í Eystur-kommunu við smávegis broytingum.<br><br>Býráðið hevði málið á skrá til býráðsfundin, 29. september 2010 og samtykti at beina málið aftur í trivnaðarnevndina til víðari viðger.<br><br>Trivnaðarnevndin mælir til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti upptøkureglar til ansingarstovnar í Eysturkommunu. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini. |
| 2. | **10/00475**<br>**Umhvørvisætlan fyri Eysturkommunu 2011 – 2021.**<br>Trivnaðarnevndin hevur heitt á umsitingina um at koma við uppskoti um eina framtíðar umhvørvisætlan fyri Eysturkommunu.<br><br>Í tilmæli heitir umsitingin á býráðið um at seta kr. 350.000,00 til fíggjarárið 2011 á serstaka konto “umhvørvið”, sum skal umfata upprudding av kommunalum økjum og ruddingardag.<br><br>Trivnaðarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum, umframt at umsitingin kannar prísin fyri, at fari verður at asfaltera ein part av ruddaða økinum um somu tíð. | Einmælt samtykt at taka við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini.<br><br>Spurningurin um pening verður viðgjørdur í samabndi við fíggjarætlanina fyri 2011. |
| 3. | **10/00384**<br>**Framtíðar mentanarpolitikkur í Eysturkommunu**<br>Trivnaðarnevndin mælir til at settur verður ein bólkur at gera uppskot til mentanarpolitikk í | Einmælt samtykt at velja Hannu Jensen, Jan E. Petersen og Jóhan Christiansen í arbeiðsbólkin. |

**Býráðsfundur mikudagin 25. oktober 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Hanna Jensen, og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi**: Jan Erlingsson Petersen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

| | | |
|---|---|---|
| | Eyturkommunu. Mælt verður til, at bólkurin verður mannaður við einum limi úr fíggjarnevndini, einum úr teknisku nevnd og einum limi úr trivnaðarnevndini.<br><br>Trivnaðarnevndin mælir til, at skrivarin í trivnaðarnevndini verður skrivari í bólkinum.<br><br>Býráðið setur ein tíðarkarm, fyri nærendaliga uppskotið skal fyriliggja.<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við uppskotinum, og mælir til at velja Jóhan Christiansen í bólkin. | Uppskotið til mentanarpolitikk skal fyriliggja tann 1. mei 2011 |
| **4.** | **10/00370 og 09/00635**<br>**Umsókn frá Absalon Absalonsen um at útseta byggifreistina**<br>Absalon er umborð á Logos Hope og verður ikki aftur í Føroyum fyrr enn summari 2011. Absalon hevur undirskrivað skeytið tann 11.02.2010, t.v.s. at byggiarbeiðið skal verða byrja innan 11.02.2011 og sethúsini skulu verða innilokaði innan 11.02.2012.<br><br>Tekniska nevnd samtykt á fundi tann 15.09.10 at útseta byggiloyvið við 6 mánaðum í mun til skeytið.<br><br>Býráðið samtyktið á býráðsfundinum tann 29.09.2010 at beina málið aftur í teknisku nevnd.<br><br>Tekniska nevnd mælir til at fylgja tilsøgnini hjá teknisku nevnd frá fundinum tann 15.09.2010, og at fylgja samtyktini fyri keyp av grundstykki/um og tilhoyrandi skeyti/skeytum frá d.d. | Taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd:<br><br>**Atkvøður fyri:**<br>Terji Lervig<br>Hanna Jensen<br>Joen Magnus Rasmussen<br><br>**Atkvøddi ímóti:**<br>Jóhan Christiansen<br>Tollakur Joensen<br>Elin V. Olsen<br>Hans Mourits Foldbo<br><br>**Atkvøddi ikki:**<br>Fríðgerð Heinesen<br><br>Sostatt er samtykt ikki at ganga umsóknini á møti. |
| **5.** | **10/00463**<br>**Umsókn um at stoypa tún og garð á matr. nr. 22 í Syðrugøtu (Petur Martin Johannesen)**<br>Umsóknin fevnir um garð sum skal byggjast fram | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd. |

**Býráðsfundur mikudagin 25. oktober 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Hanna Jensen, og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi**: Jan Erlingsson Petersen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

við kommunumarkinum út móti økinum "Fyri oman Brúgv" sum er almennur vegur.

Tekniska nevnd mælir frá at geva loyvið at gera garðin og túnið til øll viðurskiftir á økinum eru avgreidd**.**

**6.** **10/00455**

**Umsókn um stuðul til ráðstevnu í Danmark**

Umsókn er komin frá June Jónsveinsdóttir og Elsu L. Leo um møguligan stuðul í samband við at tær skulu á eina ráðstevnu í Danmark innan autismuøkið.

Trivnaðarnevndin mælir til, at málið verður tikið upp í samband við fíggjarætlanararbeiðið 2011 og at aðalorðaskiftið um førleikamenning av starvsfólki í Eysturkommunu verður tikið upp á komandi býráðsfundi.

Fíggjarnevndin mælir frá at veita stuðul. Kommunan veitir ikki stuðul til skúlagongd og aðrar útbúgvingar, uttan til fólkaskúlan.

Fíggjarnevndin metir at eitt møguligt aðalorðaskiti ikki eigur at verða á einum almennum býráðsfundi. Starvsfólkamál og starvsfólkamenning eigur at verða tikið við í eini starvsfólkareglugerð.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**7.** **10/00438**

**Umsókn um fíggjarligan stuðul til samanlagda svimjifelagið í Eysturkommunu**

Heitt verður á ein stuðul áljóðandi kr. 60.000,00

Trivnaðarnevndin mælir til, at málið verður tikið upp í samband við fíggjarætlanararbeiðið fyri 2011.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini

**Býráðsfundur mikudagin 25. oktober 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Hanna Jensen, og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi**: Jan Erlingsson Petersen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

**8. 10/00229**

**Neysti hjá Steintór Jacobsen í Norðragøtu**

Steintór Jacobsen bjóðar kommununi at gerða eitt gerðabýti har millum neystini hjá Eysturkommunu matr. nr. 170 og 171a við neystið hjá Steintór á matr. nr. 172. Skrivið frá Steintór fevnir um hesir spurningar:

1. Vil kommunan verða við til at gjalda ein part av útreiðslunum at flyta neystið longur oman.
2. Vil kommunan verða við til eitt gerðabýti sum fevnir um, at kommunan fær neystið á matr. nr. 172 og Steintór fær neystini á matr. nr. 170 og matr. nr. 171a.
3. Um kommunan ikki vil gerða gerðabýti, verður biðið um principielt byggiloyvi at breiðka neystið móti neystinum hjá kommununi matr. nr. 171a, og fáa til keyps lendið niðanfyri neystið á matr. nr. 172, t.v.s. oman móti havnarlagnum.

Tilmæli hjá teknisk nevnd eru:

1. Tekniska nevnd mælir frá at kommunan lut-tekur við at berða ein part av kostnaðinum at flyta neystið.

2. Tekniska nevnd mælir frá at verða við til eitt gerðabýti av neystunum grunda á, at mælt verður til at selja neystini á matr. nr. 170, 171a og samstundis verður mælt til at stykkið 171b eisini verður selt.

3. Tekniska nevnd mælir frá at geva principielt byggiloyvi grunda á, at kommunan ikki praktiserar principielt byggiloyvi og ikki gevur útgrevstrarloyvi. Samstundis verður

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Atkvøður fyri:**
Terji Lervig
Hanna Jensen
Joen Magnus Rasmussen
Jóhan Christiansen
Tollakur Joensen
Elin V. Olsen
Hans Mourits Foldbo

**Atkvøddi ikki:**
Joen Magnus Rasmussen

**Býráðsfundur mikudagin 25. oktober 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Hanna Jensen, og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi**: Jan Erlingsson Petersen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

mælt til, at loyvið verður givið til at keypa lendið oman móti havna-lagnum.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd. Tó mælir fíggjarnevndin frá, at neystið verður selt í løtuni.

Um so er at neystið verður selt verður. Verður tað boðið út til almenna sølu.

**9. 10/00113**
**Fíggjarætlan hjá sløkkiliðinum í Eysturkommnunu**
Tekniska nevnd mælir til at málið fer í fíggjarnevndina við endurskoðari fíggjarætlan.

Fíggjarnevndin mælir til at arbeiða víðari við fíggjarætlanini.

Fíggjarnevndin mælir til at bygging av brandstøð verður tikið við í sambandi við býarskipanar-arbeiðið, sum skal verða liðugt til 1. desember.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini

**10. 10/00407**
**2.viðgerð av eykajáttan til stuðlar**
Játtanin á fíggjarætlanini fyri 2010 viðv. børnum við serligum tørvi, heldur ikki.

Trivnaðarnevndin mælir til eykajáttan á kr. 250.000,00

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarnevndini.

100.000,00 kr. verða tiknar av konto 2.21.31.511. (barnavernd) og rest 150.000,00 kr. verða tiknar av innistandandi.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini

**11. 10/00449**
**2.viðgerð av eykajáttan til keyp at matr. nr 23 við ástandandi hoyggjhúsið í Syðrugøtu**

Einmælt samtykt at játtað kr. 150.000,00.

**Býráðsfundur mikudagin 25. oktober 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Hanna Jensen, og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi**: Jan Erlingsson Petersen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

Peningurin verður tikin av 6.22.11.510 (Byggibúning)

**12. 10/00433**

**2.viðgerð av eykajáttanum í samband við gjøgnumgongd av fíggjarætlanini fyri 2010**

Í sambandi við gjøgnumgongdina av fíggjarætlanini fyri 2010, mælir fíggjarnevndin til hesar eykajáttanir

1. 75.000,00 kr. til konto 1.11.11.510 (Samsýningar til kommunustýrislimir) frá konto 5.24.13.510 (Vinarbýarsamstarv)
2. 200.000,00 kr. til konto 2.20.22.510 (Kommunulæknaútreiðslur). Peningurin verður tikin av innistandandi
3. 30.000,00 kr. til konto 5.24.13.510 (Lávusarhús) frá konto 5.24.14.510 (Stuðul til mentan)
4. 80.000,00 kr. flytast millum Ítróttarøki og Ítróttarhøllina á Kambsdali (hetta er sama høvuðskonto so her er ikki neyðugt við eykajáttan)
5. 70.000,00 kr. til konto 6.24.51.510 (Kirkjugarðar) frá konto 6.22.11.510 (Byggibúning)
6. 200.000,00 kr. til konto 6.38.12.510 (Gøtuljós) frá konto 6.22.11.510 (Byggibúning)
7. 130.000,00 kr. til konto 2.21.61.510 (Eldrarøkt). Peningurin verður tikin av innistandandi.

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen
Joen Magnus Rasmussen
Tollakur Joensen
Elin V. Olsen
Fríðgerð Heinesen
Hans Mourits Foldbo

**Atkvøddi ímóti:**
Terji Lervig og Hanna Jensen, bæði við tí grundgeving at peningurin til punkt nr. 8 er brúktur í heimildarloysi.

**Býráðsfundur mikudagin 25. oktober 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Hanna Jensen, og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi**: Jan Erlingsson Petersen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

8. 230.000,00 kr. til konto 6.11.32.511 (fríðkan av kommununi) frá konto 6.22.11.510 (Byggibúning)

9. Hækkan av inntøku við kr. 300.000,00 av leigu á konto 7.38.14.510 (Havnir og lendingar)

**13. 10/00000**
**Val av arbeiðsbólki til býarskipanararbeiði.**

Einmælt samtykt at velja Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen og Hans Mourits Foldbo í arbeiðsbólkin.

Varalimir verða:
Fyri Hans Mourits Foldbo Tollakur Joensen
Fyri Fríðgerð Heinesen Terji Lervig
Fyri Jóhan Christiansen Hanna Jensen

**14. 10/00000**
**Val av bygginevnd í sambandi við bátahylin í Leirvík.**

Einmælt samtykt at velja Fríðgerð Heinesen, Jan E. Petersen og Tollakk Joensen

Varalimur verður Hanna Jensen

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ____________________________

Terji Lervig ____________________________

Hanna Jensen ____________________________

Joen Magnus Rasmussen ____________________________

Fríðgerð Heinesen ____________________________

Hans Mourits Foldbo ____________________________

Tollakur Joensen ____________________________

Elin V. Olsen ____________________________

## Býráðsfundur mikudagin 25. oktober 2010 kl. 19.30.

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Hanna Jensen, og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi**: Jan Erlingsson Petersen

## Fundurin lokin kl. 23.00